# Ítróttarblaðið

## Ítróttartoymið á Sosialinum:



Hilmar Jan Hansen
einslistir@email.fo


Uni Holm Johannesen
uni@sosialurin.fo


Tróndur Arge
trondur@sosialurin.fo


Heri Simonsen
heris@sosialurin.fo


Álvur Haraldsen
alvur@sosialurin.fo




## Høgni Madsen heldur fram

Heimasíðan hjá Bláu Bylgjuni, sum er fjepparafelagið hjá KÍ, skrivar á sínari heimasíðu, at Høgni Madsen spælir eisini við klaksvíkingum í 2011. Miðvallarin átti stóran leiklut í uppflytingini hjá KÍ í ár. Madsen fer væntandi at manna miðvøllin saman við Nenad Stankovic, sum skifti til KÍ úr Víkingi. – Persónarnir handan Sp/f KÍ eru tættir sum tunnan í hesum døgum, men sum skilst verður arbeitt við øllum kreftum at fáa hópin upp á pláss, skrivar heimasíðan hjá Bláu Bylgjuni.

**» Ja, hyggja vit bara eftir ÍF Føroyum, so hevur tað liðið fleiri leikarar, ið kundu spælt seg inn í hópinum hjá einum donskum 1. deildar felag**

ATLI DANIELSEN, FC ROSKILDE



**» Tá tú verður ársins venjari, so er tað jú greitt tekin um, at tú hevur eitt gott lið at venja**

BIRNIR HAUKSSON, ÁRSINS VENJARI HJÁ KVINNUM

# Team Klaksvík skiftir venjara

**HONDBÓLTUR** Pole J. Hansen og Damir Oros eru ikki longur knýttir at hópinum hjá Team Klaksvík. – Ætlanin er at fáa ein útlending afturat, sigur Fríðin Ziskason, formaður

Uni Holm Johannesen

Hann var bjartskygdur í viðtalu við Sosialin tann 13. september.

– Vit verða nummar fimm, segði Pole J. Hansen, sum júst var settur sum venjari hjá Team Klaksvík.

Men tað hevur ikki gingið eftir ætlan hjá klaksvíkingum, sum fyri fyrstu ferð royna seg í bestu deildini.

Team Klaksvík hevur tapt allar landskappingardystirnar sannførandi higartil.

Fríggjadagin varð Pole J. Hansen uppsagdur sum venjari.

Og Damir Oros, sum hevur verið leikandi hjálparvenjari, hevur tikið við sum hjálparvenjari hjá Tjaldri.

– Málið er framvegis at menna okkum og skapa størri áhuga fyri manshondbólti í býnum, sigur Fríðin Ziskason.



FRÁKOYRDUR

*– Tað eru ymsar hendingar, sum vit ikki eru nøgdir við. Felagið vil hava eitt gott grundarlag undir manshondbóltinum í Klaksvík, og venjarin hevur ikki arbeitt við tí í huga, sigur Fríðin Ziskason, formaður, um nú frákoyrda venjaran, Pola J. Hansen*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Pole er uppsagdur

Pole J. Hansen stendur ikki longur á odda fyri besta mansliðnum hjá Team Klaksvík.

Fríðin Ziskason sigur, at nevndin hevði væntað sær meira av samstarvinum. Tað var serliga aftaná landskappingardystin í Hoyvík, tá Team Klaksvík fekk 13 útvísingar, at nevndin setti spurnartekin við venjaran.

Pole J. Hansen varð burturvístur, tá hann vísti sína ónøgd.

Hondbóltssambandið gav honum leikbann í tríggjar dystir.

– Tað eru ymsar hendingar, sum vit ikki eru nøgdir við. Felagið vil hava eitt gott grundarlag undir manshondbóltinum í Klaksvík, og venjarin hevur ikki arbeitt við tí í huga. Vit høvdu millum annað bara sjey spælarar við til ein dyst, tí venjarin metti, at hinir kundu ikki brúkast. Hugurin er minkaður nógv millum spælararnar, og tí vóru vit noyddir at taka hesa avgerðina, sigur Fríðin Ziskason.

Zarko Petjrovic varð knýttur at hópinum undan kappingarbyrjan. Hann stendur fyri venjingunum komandi tíðina, og Fríðin Ziskason verður venjari undir dystunum.

– Tað er loysnin fyribils, sigur formaðurin.

### Nýggjan útlending

Team Klaksvík ætlar at knýta ein útlending afturat hópinum, sum skal spæla við í seinnu kappingarhálvu.

– Vit mugu royna at fáa nøkur stig, um hini liðini ikki skulu irreterast, at vit spæla við í bestu deildini. Men tað tekur tíð, sigur Fríðin Ziskason.

*uni@sosialurin.fo*

## *Miðlarnir skriva...*

*»Um tað var tann vælkenda venjara effektin sum gjørdi munin í dag er ilt at siga, men tað er einki at taka seg aftur í at Tjaldur maskinan koyrdi uppá tað allarbesta stóran part av dystinum. Allar vóru uppsettar uppá at fáa eitt gott úrslit.«*

**Heimasíðan hjá Tjaldrinum**

*»Mín viðmerkingin til dystin í dag er, at tað eru ótrúliga óheppið, at bæði Katrin á Neystabø og Marjun Danberg eru uttanlands, tá ið so týdningarmikil dystir skal spælast. Í útidystinum ímóti Stjørnuni var Jacklin Durhuus uttanlands, og Katrin á Neystabø spældi ikki. Hetta eru so týdningarmiklir spælarar fyri kvinnuliðið, at liðið kann ikki vera slíkar spælarar fyri uttan.«*

**Heimasíðan hjá Neistanum**

*»Ein óalmindiliga søtur javnleikur.«*

**Heimasíðan hjá Kyndli**

*»Tað er ikki, sum tey flestu siga: álop er besta verja. Nei! verja er besta verja! Okkara verja var spøk og mótfallin, og formáddi sær lítið.«*

**Heimasíðan hjá H71**